# FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

## Býráðið

**Dagfesting:** 09.09.2022 kl. 19:00
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, Magni Jøkladal, Ólavur Larsen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 27/22 | 22/00351-3 | Uppskot til dagføring av viðtøkunum og upptøkureglunum fyri dagstovnarnar í Fuglafjarðar Kommunu |
| 28/22 | 20/00586-155 | Uppskot um seming millum Fuglafjarðar Kommunu og MT-Højgaard |
| 29/22 | 22/00248-4 | Endurskoðan av fíggjarjáttan fyri 2022 |
| | | |

1

**Til støðutakan**

## 27/22
## 22/00351-3 Uppskot til dagføring av viðtøkunum og upptøkureglunum fyri dagstovnarnar í Fuglafjarðar Kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 21.06.2022 | 18/22 |
| 2 Býráðið | 09.09.2022 | 27/22 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Sosiala nevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Leiðslubólkurin á dagstovnaøkinum hevur arbeitt við einum uppskoti um dagføring av viðtøkunum og upptøkureglunum fyri dagstovnarnar. Í løtuni hevur hvør stovnur sínar viðtøkur. Allar viðtøkurnar eru næstans einsljóðandi. Viðtøkurnar fyri stovnarnar eru gjørdar ísv. at teir lótu upp. Viðtøkurnar fyri t.d. stropan eru undirskrivaðar í 2002. Í uppskotinum til dagføring av viðtøkunum, verður lagt upp til, at allir stovnarnir hava somu viðtøkur.<br><br>Stovnarnir hava felags upptøkureglar. Hesir skulu eisini dagførast.<br><br>**25. august 2022**<br>Sosiala nevnd samtykti á fundi 21. juni dagførdar viðtøkur og upptøkureglar fyri dagstovnarnar í Fuglafjarðar Kommunu, og sendi uppskoti víðari til Býráðið til viðgerðar. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Dagføring av viðtøkum og upptøkureglum |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>uppskot um regulering av reglugerð fyri dagstovnar í Fuglafjarðar kommunu<br>UPPTØKUREGLUR<br>Reglugerð fyri dagstovnin í Fuglafirði 2002<br>Upptøkureglur til dagstovnar í Fuglafjarðar kommunu |

Viðgerð

| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
|---|---|---|---|

2

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Mælt verður til at sosiala nevnd tekur støðu til dagførdar viðtøkur fyri dagstovnarnar og dagførdu upptøkureglarnar fyri dagstovnarnar í Fuglafjarðar Kommunu.<br><br>**22. juni 2022**<br>Sosiala nevnd hevur samtykt uppskot til dagførdar viðtøkur og upptøkureglar fyri dagstovnar í Fuglafjarðar Kommunu, og sendir uppskotið víðari til býráðið til viðgerðar. | | |
| Dagf | 20.06.2022<br>22.0622022 | | |

**Sosiala nevnd 21. juni 2022:**
Sosiala nevnd samtykti uppskot til viðtøkur og upptøkureglar fyri dagstovnarnar og sendir uppskotini víðari til býráðið til viðgerðar.

**Býráðið 09. september 2022:** 3
Býráðið tekur einmælt undir við dagførdu viðtøkunum og dagførdu upptøkureglunum fyri dagstovnarnar í Fuglafjarðar kommunu.

## 28/22
## 20/00586-155 Uppskot um seming millum Fuglafjarðar Kommunu og MT-Højgaard

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.05.2022 | 19/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.08.2022 | 24/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.06.2022 | 20/22 |
| 4 Býráðið | 09.09.2022 | 28/22 |

4

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Fundur hevur verið millum Rúna Abrahamsen frá MAP-arkitektum, Pætur Joensen, umboðandi Fuglafjarðar Kommunu og MT-Højgaard um útistandandi ímillum MT-Højgaard og Fuglafjarðar Kommunu í samband við bygging av nýggja barnaskúlanum.<br><br>MT-Højgaard hevur gjørt eina uppgerð yvir tað sum teir hava útistandandi hjá Fuglafjarðar Kommunu í samband við byggjaríðið av barnaskúlanum. Í høvuðsheitum er talan um rokningar fyri eyka arbeiði í tíðarskeiðinum 30. oktober 2021 til 28. apríl 2022. Samlaða útreiðslan við MVG er uppá 4.759.601 kr.<br><br>Við í uppgerðini eru 850 tús. kr. sum var eitt semingsuppskot um ein ískoytissáttmála ísv longda byggitíð. Útreiðslan bleiv góðkend á býráðsfundi í mars 2021, men skuldi ikki gjaldast til MT- Højgaard, fyrr enn øll arbeiðir vóru endaliga liðug og góðkend.<br><br>Fuglafjarðar Kommuna hevur eitt mótkrav til MT-Højgaard uppá dagbøtur svarandi til 9 – 10 mió kr.<br><br>Á fundinum blivu partarnir samdir um eitt semingsuppskot, har Fuglafjarðar Kommuna skal gjalda 1 mió kr., og at restin av skuldini til MT-Højgaard verður strika. Samstundis verður kravið frá Fuglafjarðar Kommunu um dagbøtur strika.<br><br>**Nýtt ískoyti til fundin í FN 20. juni 2022**<br>Borgarstjórin og umsitingin hevur arbeitt víðari við at lýsa málið betur síðani fundin 17. maj 2022. Víst verður í hesum til FK j. nr. 20/00586-157. |

| | |
|---|---|
| | Í uppskotinum til semju sendir MT-Højgaard kreditnotu fyri avtaluseðlarnar AS 140 og AS 148, har upphæddirnar eru ávíkavist 850.000 kr. og 2.654.898 kr. móti at Fuglafjarðar kommuna skal gjalda 1.000.000 kr. Semjan er treyta av at býráðið góðkennir hana og at Fuglafjarðar kommuna strikar kravið um dagbøtur.<br>Eitt alternativ til semjuna er, at royna málið í gerðarrætti. Hetta metir byggileiðslan vera tíðarkrevjandi og kostnaðarmikið, samstundis sum tað er ringt at spáa um úrslitið.<br><br>Byggileiðslan eftirheldur framvegis eina upphædd til MT-Højgaard uppá 1.100.000 kr. í samband við mangullista.<br><br>Tann milliónin her er talan um er tí bert knýtt at longdu byggitíðini.<br><br>**Nýtt ískoyti til fundin í FN 15. August kl. 13.00**<br>Kommunan hevur heitt á ráðgevandi verkfrøðingar Ráð um, at lýsa málið betur millum annað í mun til kravið hjá MT-Højgaard um longda byggitíð. Víst verður í hesum til FK j.nr. 22/00363-3.<br><br>Í mun til kravið frá MTH og um longda byggitíð og eftirfylgjandi uppskot til semju ímillum MTH og FK, so er niðurstøðan frá Ráð, út frá gongdini í málinum, at 1. mió. kr. er ein rímilig upphædd. Víst verður til skjalið "Endalig vurdering af økonomi og tidsforlængelse 31.07.2022".<br><br>**Ískoyti til býráðsfundin 9. september 2022 kl. 19.00**<br>Á býráðsfundi 25. Mars 2021 samtykti býráðið ískoytissáttmála við MTHøjgaard, sum bygdi á semju longda byggitíð mótvegis dagbótum og skuldi Fuglafjarðar kommuna rinda 850 tkr. MTHøjgaard tók tó ikki undir við hesi semju.<br><br>Í juni 2022, t.v.s meir enn eitt ár seinni, verður endalig semja gjørd millum byggileiðslu og MTHøjgaard uppá 1.000 tkr., sum er treytað av at býráðið góðkennir.<br><br>Málið hevur verið fyri í fíggjarnevndini, sum ynskti eina kanning av tíðarleingingini og eykaútreiðslum. Heitt varð á ráðgevandi verkfrøðinga-fyritøkuna Ráð um at gera hesa kanning.<br><br>Niðurstøðan í mun til semjuna uppá 1.000 tkr. er í høvuðsheitum at tað er "umiddlebart rimeligt" millum annað tí at býráðið frammanundan<br>• hevur samtykt at gjalda 850 tkr,<br>• at ein gerðarættur er kostnaðarmikil og krevur nógva orku<br>• at byggiharrin ikki stendur nóg sterkur í mun til uppskotið um semju |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Semingsfundur millum Fuglafjarðar Kommunu og MT-Højgaard</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">
<ul>
<li>Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>Kommunustýrislógin</li>
<li>Møgulig fylgiskjøl<br>Salg Kreditnota 70124.pdf<br>Ískoytissáttmáli við MTH.PDF<br>Býráðssamtykt mars 2021 Ískoytis sáttmáli MTH.docx<br>Avtaluseðil 204. Longd byggitíð.<br>Avtala við ráðgevandi løgfrøðingar Ráð um gjøgnumgongd av byggiverkætlanini<br>Endalig vurdering af økonomi og tidsforlængelse 31.07.2022<br>FK j. nr. 20/00363-14 FS Svar til kanning.pdf</li>
</ul>
</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Nei</td><td>Nei</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Mælt verður til, at fíggjarnevndin tekur støðu til semingsuppskotið frá fundinum millum MT-Højgaard, Pætur Joensen og Rúna Abrahamsen frá MAP arkitektum.<br><br>Nýtt tilmæli til fíggjarnevndarfund. 20 juni 2022<br>Mælt verður til at tikið verður undir við semjuni.<br><br>Tilmæli til fíggjarnevndarfund 15. August 2022<br>Mælt verður til at fíggjarnevndin tekur undir við semjuni ímillum MT-Højgaard og Fuglafjarðar kommunu um, at gjalda 1. míó. kr. fyri longda byggitíð. Síðani at málið verður lagt fyri býráðið, sum skal játta 150 tkr. afturat teimum 850 tkr. sum frammanundan eru játtaðar til semju partarnar millum.<br><br>Tilmæli til býráðsfundin 9. September 2022<br>Mælt verður býráðnum til at taka undir við semjuni ímillum MTHøjgaard og Fuglarfjarðar kommunu, um at gjalda 1.000 tkr, sum er 150 tkr. meira enn tað, sum longu er samtykt. Við hesum sleppur kommunan kravinum um dagbøtur og MTHøjgaard sleppur kravinum um 3.505 tkr. fyri longda byggitíð.</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td colspan="3">16.05.2022<br>20.06.2022<br>01.09.2022</td></tr>
</table>



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Fíggjarnevndin 17. maj 2022:**
Fíggjarnevndin ynskti at fáa málið betri lýst áðrenn avgerð verður tikin um.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2022:**
Fíggjarnevndin ynskti enn einaferð, at fáa málið betur lýst við hjálp frá uttanhýsis ráðgeva.

**Fíggjarnevndin 15. august 2022:**
Fíggjarnevndin tekur undir við at játta verða 150 tkr afturat til at røkka endaliga semju um tíðarleingin við MT-Højgaard uppá tilsamans 1 mió. kr. Fíggjarnevndin treytar sær, at 1 mió kr. verður afturhildin fyri at dekka yvir manglar í byggjarínum.

**Býráðið 09. september 2022:**
Býráðið tók einmælt undir við tilráðingini frá fíggjarnevndini um semju um tíðarleinging við MTHøjgaard uppá 1 mió. kr. og at hildin verður 1. mió. kr. aftur fyri at dekka yvir manglar í byggjarínum. 7

**29/22**
**22/00248-4 Endurskoðan av fíggjarjáttan fyri 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.06.2022 | 21/22 |
| 2 Býráðið | 23.06.2022 | 25/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.08.2022 | 25/22 |
| 4 Mentamálanevndin | 22.08.2022 | 29/22 |
| 5 Tekniska nevnd | 25.08.2022 | 61/22 |
| 6 Býráðið | 09.09.2022 | 29/22 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini. |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Tað vísir seg at kostnaðurin av at byggja nýggja skúlan og tannlæknastovuna í Fuglafirði er hægri enn upprunaliga metingin at útreiðslurna fara upp um tað í sett er av til byggingina. Harafturat verður mett at inntøkan av søluni av gomlu kommunuskrivstovuni fer at verða minni enn upprunaliga mett.<br><br>Borgarstjórin og umsitingin hava kanna møguleikan fyri at taka lán at fíggja 64-skúlan og hava fingið at vita at tað er óvist um hetta letur seg gera, so leingi skuldin hjá kommununi er omanfyri lániloftið á eina álíkning.<br><br>Tí verður neyðugt at taka rættstundis fyrivarni og gera eina útreiðsluneutrala eykajáttan har býraðið raðfestir íløgurnar av nýggjum soleiðis, at samlaða játtanin kemur at halda.<br><br>Ein fyribills uppgerð frá ráðgeva og byggileiðslu vísir, at tað koma at vænta 6.800.000 kr. í at gera skúlan og tannlæknastovuna lidna og mett verður at sølan av kommunuskrivstovuni fara at geva 1.000.000 minni enn upprunaliga mett. Tí verður neyðugt hjá býráðnum at umraðfesta 7.800.000 kr. fyri at fáa javnvág millum játtan og nýtslu.<br><br>Býráðsmeirlutin er komin við einum uppskoti til umraðfesting uppá 5.870.000 kr, sum er sent til nevndirnar at viðgera. Henda upphædd bygdi á eina misskiljing, tí ein fortreyt fyri hesi uppgerð var at øll |

8

restjáttanin á konto 411 til «64-skúlan» varð trekt frá uppgerðini frá ráðgeva og byggileiðslu.

Nevndirnar hava tikið undir við uppskotinum við smávegis viðmerkingum.

Út yvir uppskotið frá býráðsmeirlutanum verður neyðugt at finna umleið 2.000.000 kr. afturat.

Møguleiki er at taka 1.000.000 kr afturat fra konto 411 Skúlin, sum hareftir hevur eina rest uppá ca. 188.000 kr. Hin milliónin kann møguliga takast frá konto 632 Kommunal útstykking.

Kannast skal sjálvsagt um tað longu eru gjørdar nakrar bindingar á hesum kontum, sum ger at umraðfestingin ikki ber til.

**Ískoyti Fíggjarnevndarfundin 15. august 2022**
Umsitingin í kommununi hevur síðani seinasta arbeiðsfund arbeitt við at fáa eitt betri yvirlit yvir hvat er eftir at gjalda í samband við verkætlanina "Nýggji skúlin" og sum ikki kunnu haldast innan verandi játtan.

Yvirlit yvir útreiðslur til skúlan eru sett i talvuna niðanfyri:

| | |
|---|---:|
| MT-Højgaard ógoldnar rokningar | 3.807.681 |
| MT-Højgaard semja um tíðarleinging | 1.000.000 |
| Heildarverk, írestandi arbeiði | 1.300.000 |
| Heildarverk umbønir | 800.000 |
| Ljóðtøkni | 200.000 |
| talvur | 125.000 |
| Innbúgv. Tónleikarúm | 200.000 |
| MAP Byggileiðsla longd byggitíð | 475.000 |
| VáL | 670.000 |
| annað | 100.000 |
| **Íalt u/mvg** | **8.677.681** |
| mvg | 542.355 |
| **Íalt v/mvg** | **9.220.036** |

Út yvir omanfyrinevndu upphædd er framvegis óvissan um søluna av gamla kommunukontórinum har, borgarstjórin á seinasta býráðsfundi bað um at kunna fara upp til 1 mió. kr. niður í søluprísi.

**Ískoyti til fundin í mentamálanevndini 22. august 2022**
Fíggjarnevndin hevur heitt á faknevndirnar um at viðgera verandi fíggjarætlan fyri 2022.

**Ískoyti til fundin í teknisku nevnd 25. august 2022**



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | Fíggjarnevndin viðgjørdi málið 15. august, har heitt varð á faknevndirnar um at endurskoða fíggjarætlanina fyri 2022, tí neyðugt var við eini eykajáttan á kr. 6.800.000,- til skúlan.<br>Eftirfylgjandi er ein dagførd uppgerð gjørd, har tað kemur at mangla kr. 9.220.000,- í til skúlabyggingina. Hetta er grundað á eina misskiljing millum byggileiðslu og umsiting, har nakrar rokningar manglaðu at verða innlisnar í Navision.<br>Fíggjarnevndin viðgjørdi uppskotið um umraðfestingar 15. august 2022, har nevndin samtykti at heita á faknevndirnar at gjøgnumganga dagførda uppskotið um umraðfestingar enn einaferð, saman við leiðarunum á ymisku økjunum. Fíggjarnevndin biður um svar frá umsitingini skjótast tilber, men í seinasta lagi 1. september 2022.<br><br>**Ískoyti til Býráðsfundin 9. September 2022**<br>Síðani býráðið á fundi 23. Juni 2022 viðgjørdi málið fyrstu ferð hevur tað verið viðgjørt fyrst í fíggjarnevndini 15. august, sum sendi uppskot til umraðfestingar til hinar nevndirnar. Nevndirnar hava viðgjørt málið og eru komnar við svari. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | At íløguútreiðslurnar til skúlabyggingina í fuglafirði eru hægri enn avsett og at minni fæst fyri sølu av gomlu kommunuskrivstovuni enn upprunaliga mett. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Kommunulógin og Fíggjarætlan hjá Fuglafjarðar kommunu 2022<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 22/00248-17 Íløguuppskot eykajáttan við viðmerkingum dagført 5. sept. 2022 |
| Viðgerð | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar \| Stuttíðar \| Langtíðar<br>Fíggjarligar \| Ja \| Ja<br>Umsitingarligar \| Nei \| Nei |
| Tilmæli | Mælt verður til at fíggjarnevndin tekur undir við at gera útreiðsluneutrala eykajáttan, soleiðis at javnvág verður ímillum játtan og nýtslu, sum skal leggjast fyri á fyrst komandi býráðsfundi og eftirfylgjandi býráðsfundi.<br><br>**Nýtt tilmæli til býráðsfundin 23. juni 2022**<br>Fíggjarnevndin og kommunustjórin mæla til eina útreiðsluneutrala eykajáttan við hesum lækkingum:<br><br>Íløgur 2022 \| Kontonr. \| Eykajáttan Lækking |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | |
|---|---|---|
| Mentunarhúsið | 541 | 250.000 |
| Piddasahandil | 565 | 70.000 |
| Fløtugerði | 571 | 800.000 |
| Umhvørvi og orka | 621 | 250.000 |
| Útstykking Kambsdal | 633 | 500.000 |
| Vatnveiting | 651 | 2.500.000 |
| Fuglafjarðar havn | 751 | 1.500.000 |
| Íalt | | 5.870.000 |

Og hesum hækkingum:

| Íløgur 2022 | Kontonr. | Eykajáttan Hækking |
|---|---|---|
| Søla kommunubygningur | 160 | 1.000.000 |
| Skúlin | 411 | 4.870.000 |
| Íalt | | 5.870.000 |

**Nýtt tilmæli til Fíggjarnevndarfundin 15. august 2022**
Mælt verður til at Fíggjarnevndin enn einaferð gjøgnumgongur íløgujáttanina fyri 2022, við tí fyri eyga at útseta verkætlanir, sum ikki longu eru settar og gongd og har Fuglafjarðar kommuna ikki hevur bundið seg at avhalda útreiðslur í 2022. Uppskotið eigur síðani at verða lagt fyri tær nevndir hvørs øki verður rakt av umraðfestingini til ummælis áðrenn málið verður lagt fyri býráðið til aðru viðgerð.

**Nýtt tilmæli til fundin í mentamálanevndini 22. august 2022**
Nevndin mælir til at

**Nýtt tilmæli til fundin í teknisku nevnd 25. august 2022**
Tekniski leiðarin mælir nevndini til at gjøgnumganga fyriliggjandi dagførda uppskotið frá fíggjarnevndini um endurskoðan av fíggjajáttanini fyri 2022.

**Nýtt tilmæli til býráðsfundin 9. September 2022**
Mælt verður til eina útreiðsluneutrala eykajáttan við hesum lækkingum:

| Íløgur 2022 | Kontonr. | Eykajáttan Lækking |
|---|---|---|
| Mentunarhúsið | 541 | 250.000 |
| Piddasahandil | 565 | 70.000 |
| Fløtugerði | 571 | 1.000.000 |

| | |
|---|---|
| | Umhvørvi og orka \| 621 \| 250.000<br>Fríøkir og frístaðir \| 625 \| 250.000<br>Útstykking Kambsdal inkl søla \| 633 \| 900.000<br>Vatnveiting \| 651 \| 2.000.000<br>Gongubreyt Kambsdal - Fuglafjørð \| 673 \| 500.000<br>Fuglafjarðar havn \| 751 \| 1.500.000<br>Íalt \| \| 6.720.000<br><br>Og hesum hækkingum:<br>Íløgur 2022 \| Kontonr. \| Eykajáttan Hækking<br>Søla kommunubygningur \| 160 \| 1.000.000<br>Skúlin \| 411 \| 5.720.000<br>Íalt \| \| 6.720.000<br><br>Víst verður til FK j. nr. 22/00248-17 Íløguuppskot eykajáttan við viðmerkingum dagført 5. sept. 2022. |
| Dagf | 20. juni 2022.<br>23. juni 2022.<br>22. august 2022. |



**<u>Fíggjarnevndin 20. juni 2022:</u>**
Nevndin vísti á at tað ikki er nyðugt at biðja um eykajáttan til peningin sum stendur á konto 411 til skúlan, men viðmerkir at tað má steðgast við nýggjum virksemi í «64-skúla»-verkætlanini fyribils.

Hóast ávís óvissa er um ítøkuligu meirútreiðslurnar, so tekur nevndin undir við útreiðsluneutralu eykajáttanini fyri at binda um heilan fingur uppá 5.800.000 kr. Út yvir uppskoti hjá meirlutanum (minus 1.000.0000 av konto 411) verður 500.000 kr. flutt frá konto 651 Vatnverkið og 500.000 kr. 751 Fuglafjarðar Havn.

**Býráðið 23. juni 2022:**
Býráðið tekur við atkvøðugreisluni 5-4 undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og kommunustjóranum um útreiðsluneutrala eykajáttan. Málið skal hava eina 2. viðgerð. Sonni á Horni, Gudny Vang, Lillian Jacobsen og David Andreassen atkvøddu ímóti.

**Fíggjarnevndin 15. august 2022:**
Fíggjarnevndin avgjørdi, at senda uppskot til umraðfestingar út til nevndirnar við áheitan um at gjøgnumganga uppskotið saman við leiðarunum á ymisku økjunum. Svar skal sendast umsitingini skjótast gjørligt og í seinasta lagi 1. september 2022.

**Sosiala nevnd 22. august 2022:**
Við útgangsstøði í viðgerðini av mál 22/22 viðv. verkætlanini fyri nýggjan køk til Vesturstovu, var Sosiala nevnd á einum málið um, at tað kanska er møguligt at flyta nakað av útreiðsluni til komandi fíggjarár. Hettar krevur tó, at býráðið/fíggjarnevndin verður kunnað um verkætlanina sum skjótast, tí støða má takast til samlaðu verkætlanina

**Mentamálanevndin 22. august 2022:**
Meirilutin í nevndini tekur undir við fyriliggjandi uppskoti. Gudny Vang er ikki samd í raðfestingini.

13

**Tekniska nevnd 25. august 2022:**
Nevndin samtykti at áseta nýggjan fund í komandi viku, og at seta málið á skrá aftur, tí at nýtslan á uppskotinum frá borgarstjóranum er ikki dagført til dags dato.

**Býráðið 09. september 2022:**
Býráðið tók einmælt undir við úteiðsluneutralu eykajáttanini við tí broyting at 240 tkr. verða fluttar frá rakstrarstað 265 Vesturstova(íløga) til rakstrarstað 751 Fuglafjarðar havn(íløga). Orsøkin er at íløgan til nýggjan køk í Vesturstovu verður útsett til komandi ár og skal tillagast í komandi fíggjarætlan.

Fundurin lokin kl. 20:00

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

David Andreasen

Edva Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Gudny Vang

Magni Jøkladal

Ólavur Larsen



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo